## Óttast oljuyvirgang

Vandin fyri yvirgangi ímóti oljutbúnaði veksur, so hvørt sum tey stóru oljufeløgini økja virksemið kring heimin.

Tey bæði stóru norsku oljufeløgini, Statoil og Norsk Hydro, hava tey seinastu árini gjørt íløgur í oljuvinnu í fleiri londum, sum ikki verða mett at vera serliga trygg. Herfyri fór Statoil undir oljuvirksemi í Algeria, og leiðslan í felagnum váttar fyri Dagsavisen, at felagið hevur brúkt nógvar pengar til at tryggja síni arbeiðsfólk har, tí Algeria má roknast sum eitt land, har ávísur vandi er fyri yvirgangi.

Altjóða oljufeløgini hava ávarað um vandan fyri yvirgangi. Trygdarstjórin hjá Shell, Ian McCredie, sigur, at vandin fyri yvirgangi er ein veksandi trupulleiki hjá oljufeløgunum.

– Tað er ongantíð hugaligt at noyðast at hava vápn við sær til arbeiðis, sigur hann við Financial Times.

### Stríð um lík

Í Russlandi hevur ein av ráðgevunum hjá Vladimir Putin, forseta skotið upp, at líkið av gamla leiðaranum Lenin verður jarðað, men tað eru minni enn so allir russar, sum eru so fegnir um uppskotið.

Í áttati ár hevur tað balsameraða líkið av Lenin legið til framsýningar í Moskva, og á hvørjum ári koma fólk í túsundatali at hyggja at tí. Nógvir eldri russarar meta hann framvegis sum ta stóru hetjuna, sum loysti russar úr leinkjunum hjá gamla zarveldinum, meðan nógv av teimum yngru meta hann sum brotsmann og drápsmann, skrivar AP.

Georgij Poltavsjenko, forsetaráðgevi, heldur, at tíðin er komin til at jarða Lenin. Hann sigur, at russiska søgan er merkt av stríði, og at tað er skeivt, at ein upphavsmonnunum til stríðið skal liggja sum ein miðdepil í sjálvum høvuðsstaðnum. Fleiri politikarar taka undir við ráðgevanum, men kommunistaleiðarin, Gennadij Sjuganov, heldur, at slíkt tos er ein roynd at fáa russar at gloyma sína søgu.

Russiskir serfrøðingar siga, at málið um líkið av Lenin verður kanska loyst av sær sjálvum um stutta tíð. Líkið er heilt einfalt so illa farið, at tað er um at fara í upployson, siga teir.

## Lá fýra dagar í bilvraki

Nýsælendski lastbilførarin Frank Huia helt seg hoyra eina kúgv drynja, tá hann nú ein dagin noyddist at steðga bili sínum, tí trupulleikar vóru við motorinum. Hann fór tí yvir um vegin, og har sá hann, at tað var ein kvinna, sum rópti eftir hjálp. Kvinnan lá í einum bili, sum var farin útav fýra dagar frammanundan. Tvey onnur fólk, bilførarin og ein kvinna, sum sat aftanfyri, vóru deyð.

– Tað er ófatiligt, at hon var á lívi, men eg eri vísur í, at hon hevði ikki klárað eina nátt afturat, so tað var sera heppið fyri hana, at lastbilførarin fekk trupulleikar við motorinum júst har, sigur tyrluskiparin, sum flutti kvinnuna á sjúkrahús.

Læknarnir á sjúkrahúsinum siga, at kvinnan var illa fyri, tá hon kom hagar. Hon var ógvuliga køld, hevði fleiri brunasár, og harafturat hevði hon okkurt beinbrot. Men hon kom kortini skjóitt fyri seg, siga læknarnir.

## Fáa ikki fólk

Tað gongur so illa hjá donskum fyritøkum at fáa fólk, at í løtuni eru umleið 100.000 arbeiðspláss, sum eru ósett. Tað vísir ein kanning hjá Danske Bank.

Kanningin vísir, at tað er serliga fyritøkur innan tænastuvinnuna, sum søkja eftir fólki. Sagt verður, at tænastufyritøkurnar hava verið varnar við at seta fleiri fólk í arbeiði, men at soleiðis er ikki longur.

Tann stóri eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi hevur gjørt, at summar vinnugreinar fáa ikki tey fólk, teimum tørvar. Tí hevur stjórnin gjørt av at tátta reglurnar, soleiðis at fleiri av teimum, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, skulu fara til arbeiðis. Claus Hjort Frederiksen, ráðharri, sigur við Børsen, at tað er ikki rætt, at fyritøkur ikki fáa tey fólk, tær hava brúk fyri.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Borgarstjórin vil sleppa í Hvítu Húsini

**Rudolph Giuliani gjørdist kendur aftan á atsóknina at New York fyri fýra árum síðani. Tá var hann borgarstjóri í býnum, men nú hevur hann ætlanir um at flyta til Washington**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Rudolph Giuliani. Nú umhugsar hann at stilla upp til forsetavalið í 2008.*

Í september í 2001 bleiv Rudolph Giuliani umrøddur sum borgarstjórin í USA. Síðani hevur lítið verið at frætta frá honum. Ta mesta av tíðini hevur hann ferðast landið runt og hildið fyrilestrar, men nú umhugsar hann at fara aftur upp í politikk.

– Eg haldi, at eg byrji aftur. Eg havi nakrar politiskar hugsjónir, segði Giuliani á fundi við nakrar vinnulívsmenn fyrr í vikuni.

Aftan á atsóknina at World Trade Center var Giuliani ein tann best umtókti politikarin í USA, og hann gjørdi eisini sítt til, at George W. Bush varð afturvaldur í fjør. Bush kann ikki stilla upp á valinum í 2008, og tað er væl hugsandi, at Guiliani fer at royna at gerast valevni hjá republikanarunum tá, skrivar AP.

Meiningakanningar í amerikonskum fjølmiðlum hava víst, at gamli borgarstjórin í New York er framvegis ein av teimum best umtóktu republikonsku poilitikarunum.

# Walesa fer úr Solidaritet

**Nú 25 ár eru liðin, síðani Solidaritet varð stovnað, ásannar gamla frælsishetjan Lech Walesa, at tað hevur ikki gingið, sum hann hevði ætlað**

PÓLAND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fimm árum síðani fór Lech Walesa burtur úr polskum politikki. Hann hevði verið forseti frá 1990 til 1995 og royndi seg aftur á valinum í 2000. Men úrslitið var bara 0,9 prosent av atkvøðunum, so hann valdi at taka seg burtur úr politikki.

Nú fer hann eisini burtur úr fakfelagnum Solidaritet, sum hann var við til at stovna í 1980.

– Eg fari úr fakfelagnum, men sleppi ikki samhaldsfestinum, tí nú ætli eg mær at virka fyri einum samhaldsfesti, sum røkkur út um mørkini hjá felagnum, sigur hann við Aftenposten og leggur afturat, at hann nú fer at virka fyri størri samhaldsfesti í Evropa.

### Ikki sum ætlað

25 ár eru liðin, síðani Walesa og hansara felagar á skipasmiðjuni í Gdansk stovnaðu Solidaritet. Felagið var ólógligt, men fjúrtan dagar seinni slakaði polska stjórnin og gav felagnum loyvi at virka.

Síðani er nógv hent. Jarntjaldið fór frá í 1989, og árið eftir varð Walesa valdur til polskan forseta. Men gongdin eystanfyri hevur ikki verið júst, soleiðis sum tann gamli fakfelagsleiðarin hevði ætlað.

– Eg hevði aðrar ætlanir við Pólandi, men fall kommunismunnar var ein ov stórur biti fyri Evropa og heimin, sigur Walesa. Sjálvur skjeyt hann upp, at londini eystanfyri skuldu fáa eina Marshallhjálp fyri at fáa sum mest burtur úr tilfeinginum.

– Kommunisman kann og hevur eisini fingið skyldina fyri mangt og hvat, men fólk høvdu góða útbúgving og kundu tí komið við einum munagóðum ískoyti til vinnuvegir og íløgur. Men gongdin gjørdist ein onnur, sigur Walesa, men skundar sær at leggja afturat:

– Men vegurin er tann rætti, sjálvt um vit snara í so ofta.